ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv. ft.

## TIL SØLU

Vegna Sp/f Svalin Kolonial í konkurs er ymiskt vanligt kiosk/matvøruhandilsinnbúgv og lagur til sølu fyri hægstbjóðandi. Eitt nú kølidiskir, frystiboksir, telduútgerð, hyllar, terminalur o.a.

Bjóðast kann upp á lutirnar samlað ella hvør sær.

Tað er ikki ómøguligt at yvirtaka leigumálið, og harvið yvirtaka handilin allan sum hann er.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til

Advokatskrivstovuna

Frúutrøð 4 · 100 Tórshavn · Tel. 353335

att: Aksel V. Johannesen, advokat, teldupost, avj@jura.fo ella Maibritt Johannessen, skrivara, teldupost, maj@jura.fo

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

## Starv

Søkt verður eftir einum framfýsnum fólki til leksiuhjálp til næmingar í Vágs- og Porkeris kommunu

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur læraraútbúgving ella líknandi førleika, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðar samstarvseginleikar.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, leiðara á Sosialu Deild tlf. 37 36 04, ella til Sakaris Dimon, samskipara á NSR Suður tlf. 238771 ella t-post sakaris@nsrsudur.fo

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Anna Djurhuus í seinasta lagi **17. oktober 2008 kl 12.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo



## Tofta skúli

Heygsveg 28 · FO 650 Toftum
Tlf. 447332 · fax 449532 · t-postur: tof@skulin.fo

## Tofta skúli søkir eftir avloysara fyri lærara í barnsburðarfarloyvi

Tíðarskeiðið verður frá 6. november til 6. juni 2008

**Skúlanum tørvar lærara, ið kann átaka sær:**
- føroyskt, rokning, sang, kristni í 1. flokki og 9. flokki
- tónleikabreyt 10. flokki
- stuðul í flokkum og hjá næmingum

**Vit vænta at tú:**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert fús/ur at taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastarvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 28. oktober kl. 12.00

Nærri fæst at vita um starvið frá Maritu Dalsgaard, skúlastjóra á tlf. 447332 & 747765.

**Tofta skúli** hevur 198 næmingar í 1. – 10.fl. og 27 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/tof/






**Hjálpi jødunum heim!**

***Russell Bowels, sum arbeiðir fyri felagsskapin Ebenezer Emergency Fund, sum stuðlar Operation Exodus í at hjálpa jødunum heim, verður at hoyra á hesum møtum:***

Getsemane í Klaksvík fríggjakvøld 10/10 kl. 20.30

Lívsins Orð í Runavík leygarkvøld 11. okt. kl. 20

Filadelfia í Havn sunnumorgun 12/10 kl. 10.45

Keldan í Skálafirði sunnudag 12/10 kl. 17.00

*Fyrireikararnir*

FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

## KUNNGERÐ
### UM VALEVNISLISTAR TIL KOMMUNUVALIÐ Í FUGLAFJARÐAR KOMMUNU

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at sambært kunngerð frá Løgmálaráðnum, dagfest 23. september 2008 verður kommunustýrisval í Fuglafjarðar kommunu **týsdagin tann 11. november 2008.**

Ein valevnislisti kann í mesta lagi hava 13 valevni og skal verða undirskrivaður av í minsta lagi 15 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal verða ein serligur listi yvir stillarar, hvar teir skiliga eru lýstir við navni, starvi og bústaði.

Ein persónur kann bert verða stillari á einum lista.

Valevnislistar skulu latast inn til *Jákup Frants Larsen*, býráðsskrivara ella *Arnold Abrahamsen*, valnevndarformann **í seinasta lagi 21. oktober 2008 kl. 18.00** av einum stillara.

Uppskot um, hvussu ein valevnislisti eigur at verða settur upp, kann verða fingið til vega við at venda sær til býráðsskrivstovuna ella valnevnevndarformannin.

Avgreiðslutíðirnar á býráðsskrivstovuni eru millum kl. 10.00 og 15.00 mánadag til og við fríggjadag.

Býráðsskrivstovan hevur tann 21. oktober 2008 opið til kl. 18.00.

*Fuglafjørður, tann 01. oktober 2008*

**Kommunuvalnevndin**
Arnold Abrahamsen
formaður

## Lær at dansa í Trongisvági



Dansistovugaman skipar aftur í vetur fyri undirvísing í fólkadansi og eingilskum dansi.

Dansað verður sunnukvøld frá kl. 20.00 til 22.00 í skúlagarðinum í Trongisvágs skúla. Fyrstu ferð sunnukvøldið 19. okt. kl. 20.00.

Um áhugi er fyri tí, verður eitt hold fyri byrjarar kl. 19.00 til 20.00.

**Øll eru vælkomin, pør eins og støk.**

Kostnaðurin er kr. 20,00 fyri hvønn hvørt dansikvøldið umframt kr. 100,00 í limagjaldi til Dansistovugaman.

Áhugað kunnu ringja til Oddbjørg, tlf. 371194, Jákup Petur, tlf. 214731 ella Martin, tlf. 211271. Ella senda teldupost til martins@skulin.fo.